Nú líður hjá Restorffs

BRYGGJARÍ
Tíðindasrkiv frá Restorff

Á Várjavndegi ígjár kom Restorffs Páskabryggj á marknaðin. Í ár er eisini Munchener Malt umframt tað vanliga maltið nýtt til páskabryggið. Hetta gevur ein extremt rundan og bleytan smakk, góðan lit og rætta nøgd av skúmi. Øldrekkarar av báðum kynum fara at dáma hetta bryggj. Tað verða bert framleiddar umleið 20.000 fløskur.

Yvir 200 fólk eru nú limir í Restorffs Club, klubbur livsnjótaranna og teimum sum dáma væl gott øl. Enn kunnu áhugað seta seg sum lim á email: restorff@post.olivant.fo. Fyrsta tiltakið verður í komandi viku.

Tað líður nú væl við arbeiðinum at gera Vertshúsið liðugt. Listarmaðurin Tróndur Patursson prýðir húsið. Ætlanin er at lata upp á Flaggdegnum.

ÚF

Morgunlestrar
24.–29. mars

Bergur Jacobsen, prestur, lesur

Sálmar:

Mánadagin 24. mars:
nr. 150 Hvørt tað ríki lágt má liggja
nr. 230 Hægstur Heilagur Andi

Týsdagin 25. mars:
nr. 255 Vár Guð er føst og haldgóð borg
nr. 134 Rita navn títt mær í hjarta

Mikudagin 26. mars:
nr. 339 Heimsins børn so mangan stað
nr. 337 Guð havi lov, tí Harrans orð

Hósdagin 27. mars:
nr. 556 Á morgni árla vit Guði lova
nr. 235 Halgi Andi, kom tú inn

Fríggjadagin 28. mars:
nr. 70 Jesus, kom og hjá mær ver
nr. 80 Lat títt dýrabara navn

Leygardagin 29. mars:
nr. 340 Sum hjørtur á løkirnar stundar

Vika 12 – 19. mars
Vinnaratøl: **03 - 19 - 26 - 30 - 43 - 45**

Eykatøl: **09 - 47**

6 vinnaratøl:	**898.089,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**63.460,- kr.**
5 vinnaratøl:	**4.089,- kr.**
4 vinnaratøl:	**143,- kr.**
3 vinnaratøl:	**44,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

GJALDOYRAKURSIR

Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum		**20.03.03**	**Ultimo februar**
USA	**Dollarar**	702,4100	688,9400
Bretland	**Pund**	1098,9400	1085,6800
Svøriki	**Króna**	81,1200	81,2200
Noreg	**Króna**	94,0400	96,1600
Sveits	**Frankur**	505,6500	507,7700
Ísland	**Króna**	8,9200	8,8500
Kanada	**Dollari**	474,3600	461,7200
Japan	**Yen**	5,8425	5,8343
	Evra	743,9300	742,8200

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ

336

21. MARS	VATN 1	MAÐUR	REIKIS MARK	BÝUR	SUNKIÐ 2 BÝUR	SEKS	NARVIN	500	SVAKT	FAR	URAN	RÁNME		SVENSKT FIRMA	LITUR	21. MARTS
SPANS. BÝUR				2				GUÐUR / PLANTA			VINGLA	FELAG / KANTON			SEINNA / KJUSHIÐ	
SJÓN-VARP			RO / LÆGD			MISTER	BARRIN / LAG									
SAUL-ARI					3									TÓNI / IKKI		
ARAB-ARI								GRAMM / FÁTEK		DONSK RITA / TOSS.Á					TYSKL. / TÓNI	
EDD		REGIN OLSEN			Á Í USA	MATUR / HÁST			4			TJEKKI / GUÐUR				
TVÍ-LYÐD		KALIUM / FARSKT VATN		UN / SOO			REX / 50		HERSETT ØKI / KONA					SVII / TÝSK Á		
OYGGJ									5		KRAM-VÆGIS / MAÐUR				TONS SKOTS. BÝUR	
KONA				ÍOWA / GALWAY			TVÍ-LYÐD	KONU / KELI-NAVN					DONSK OYGGJ / EIND			
STÍGUR										NAVN / SER-LIGT						
ÍFYLLA		6		WATT / LEITA		TÓNI	EITT / REGINA		EGIL NIELSEN / ITALIA			TEKEL / GRÁUR				
SKOTSK. DRAMGUR			7								GRAM / REAUMUR			TÓNI / SKEIÐ		
LITUR		SKAGEN	TIRRI / SYTTINN			9	BELGIA / KILO		HERUR / AMAÐUR				ALDURS / KONA			
SPADA-NAVN										10	MERKJA / KLOKKAN					
EDD		SUBUR-OMRÁÐ / BETA			8	HÁ-LYÐD		NULL / KÓS		MAÐUR / AMPERE				DUPULT V	ABER-DEEN	YTRIUM
	SAGNIÐ TALGA-SKIP							BÝUR Í HET-LANDI								

Vinnari:

Merrý Eyð Jacobsen
Hákunargøta 17
188 Hoyvík

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: VÆLSIGNILSI

V	A	K	N	A	Ð	U	R	V	Á	R	S	Í	N	S	Ø
E	M	B	A	R		L	Æ	A	R		Í	V	A	R	S
S	Í		V	A		L	T		S	O	N	Í			O
T	N		A		U		T		T	N		N	Í	N	N
A			D	Ý	R	Ð	Á	V	Í	K	O	G	V	Á	G
R	Í		R			O		E	Ð	L	A		A	T	U
A	N	G	A	R	A		K	R		A	S		S	A	R
V	A		N	E	L	S	O	N		R	A	D	A	R	
Á		E	G	Í	L	S	N	E	S		N	Í	M		P
G	Ø	T	U	D	A	L	U	R	Í	N		O	U	R	E
R	U	R	A	R		R		L	Í	N	D	R	A	R	
M	Í	R		R		F		Í		N	A	A		N	A
E	N		Á		B	Í	L	L	U	N	D		K	G	
Í	D	E	N	T	Í	T	E	T		A	E	G		A	M
N	Í		O	W	E	N	S		A		L	E	Í	R	Í
Í	R	A	N	A	R	Í		U	N	D	A	R	L	Í	G

Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

336

Loysunarorðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt

TILTØK

Gudstænastur 3. sunnudag í føstu
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen. Talvan gongur fyri »Breyð til heimin«
Havnar kirkja: kl. 11, Erland Beder. Talvan gongur fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar: »Breyð til heimin«
Nólsoy: kl. 12, Sonja Klein
Kaldbak: kl. 12, Bjarni Bæk
Selatrað: kl. 12, Bergur D. Joensen
Friðrikskirkjan: kl. 11, Uni Næs
Christianskirkjan: kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10, *Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
Norðskála: kl. 11.40 skriftarmál, kl. 12 messa,
Eiði: kl. 17 messa, Emil Olsen
Tvøroyri: kl. 11,
Hvalba: kl. 12.30, altarg., Jónsvein Bech
Haldórsvík: kl. 12, Inga Poulsen Dam, Vestmanna kirkjukór luttekur
Miðvágur: kl. 12, David Johannesen
Fuglafjørður: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Sandur: kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
Kvívík: kl. 12, Marjun Bæk
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalið

4. grein skótar
Vit hittast mánadagin kl. 19.30 í KFUK.

Hebron, Argir
Fríggjakvøldið kl. 21 Bønar- og lovsangsløta fyri ung úr 8. flokki og uppeftir.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Jan Zachariassen talar og greiðir frá um bíbliuskúla í Ungarn fyri deyv. Møti verður tolkað. www.hebron.fo

Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum
Fríggjadag kl. 20 Ungdómsmøti, kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli og juniormøti, kl. 15 Barnakórið venur. Kl. 18 Familjumøti við Jónu Thomsen. Heimasíða okkara: www.koma.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti – Irena og Eyðun Christiansen tala. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 7.40 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni. Eingin sunnudagsskúli verður.
Sunnudagin kl. 14.30 vitjan av Lidu van Diij og Elmu Streit, limir í Focolari felagsskapinum. Fyrilestur v/ video og bønarløta aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týsdagin 25. mars Boðan Harrans kl. 20 Andakt í Kirkjuni við hinum miskunnsama rósukransinum og bótarinnar sakramenti.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13
Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Í kvøld kl. 20 Møti v/ skopuningum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ skopuningum.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Samkoman Lívdin
Í Hoyvíkar skúla sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, ymiskir luttakarar og tilbiðjanarmøti kl. 12, har Jens Wang talar um: 1. Korint 11, 2-16 – Kvinnan í samkomuni.

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Mikukvøldið kl. 20 húsmøti hjá Svein og Metu Askildsen, Kollafjørður.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30. ATAP Barnaklubbur
Leygardagin kl. 10 Vaskidagur.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Týsdagin kl. 17 Fritíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17 AWANA, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Olaf Magnussen, Manskórið syngur.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Ámundi Berthelsen.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

Møtirøðin við Eliezer Braun og Moses Hansen
Í dag kl. 20 Møti í kappróðrarneystinum á Glyvrum.
Sunnudagin kl. 11 Møti í Filadelfia í Havn og kl. 18 Møti í Læraraskúlahøllini.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Moses Hansen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Møti í Læraraskúlahøllini v/ Moses Hansen og Eliezer Braun.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Leygardagin kl. 14-18 Bíbliutímar.Evni: Esra og Nehemias. – John Vilhelmsen, Árrás 9.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

Aglow, Norðstreymoy
Aglowdagur v/ Landsleiðsluni verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 29. mars kl. 18. Ókeypis dørurði. Tekning á tlf. 424599 ella 424264 innan mikudagin 26. mars. Evni: m.a. hvat er Aglow. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Glæman, Kvívík
Møti verður leygarkvøldið kl. 19 við Vivi Hammer o.ø.

Saron, Vestmanna
Leygardagin kl. 15 til 17.30 Bíbílseminar við Jóhan Hendrik Hansen, evni: Hvat og hvør er Gud? Kl. 16 Kaffisteðgur.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 Húsmøti hjá Magnus Paula Johannesen. Telefonandaktin 424741.

Missiónshúsið í Miðvági
Familjumøti verður Sunnudagin kl. 16, barnakórið luttekur. Tí eru sunnudagsskúli og sunnukvøldsmøti avlýst.

Páskastevnan 2003 í ítróttarhøllini á Skála
Høvuðstalarar á stevnuni verða Hilda og Erik J. Bedsvaag trúboðarar í Kenja og Envald Flåten, Noreg.

Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Símun Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

Missiónsvika í Funningi
20.-23. mars 2003
Fríggjadagin kl. 17 Barnamøti v/ Petur Hans og Hansu Mariu. Kl. 20 talar Torleif Johannesen, Menn av Strondum syngja.
Leygardagin kl. 17 Barnamøti v/ Jónu Thomsen, kl. 20 Sylverius Jacobsen talar, Jónhilda og Gulak syngja.
Sunnudagin kl. 15 Sunnudagsskúli v/ Marianna Poulsen, kl. 18 talar Niels Jcaob Nielsen, Leila Højgaard syngur. Innsavnan til Heimamissiónina.

Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Sangmøti.

Keldan
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi.
Leygardagin kl. 17.30-19.30 Junior fyri gentir og dreingir 3.-7. flokk. Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús, við Rúna Rasmussen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Pola Jacobsen, Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Evangeliskt møti
verður í hølinum hjá Arbeiðarafelagnum »Hæddini« í Saltangará hósdagin 27. mars kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin! V. Schaffalitzky og I. J. Hildershavn.

Thabor, Fuglafjørður
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og møti kl. 18, har savnað verður inn til Heimamissiónina.

Gøta
Ungdómsmøti verður í Kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20 við Sámal Petur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tofta missiónshús
Hey tit ungu! Vit fara til Havnar at bowla og eta í dag. Bussurin fer frá missiónshúsinum kl. 16.30. Møtið stundisliga!

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 15 Opið hús fyri børn, kl. 20 Møti fyri pør v/ H. E. Hammer.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Getsemane
á Brekku 19, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 20 er Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin!

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Barnarbeiði (3) 4 til 6 ár, kl. 14 Barnaarbeiði 1., 2. og 3. fl. kl. 16 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. fl.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Verið hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Ískvøld kl. 18 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna Missiónsvikuna á Sandi.
Mánakvøldið kl. 18 Bønarløta.

Sandoy
Allir sjómanskvinnuringarnir í oynni samlast í Eiriksgarði í Dali mánadagin kl. 19.30. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Hvalba.

Bygdarhúsið í Lopra
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna missiónsviku í Hvalba.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti har Fríðbjørg og Niels Hammer syngja og tala. Eisini luttekur Simone Knudsen við sangi.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

Sion, Vágur
Sunnumorgun kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting. Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Tilhaldið í Sandoynni
Opið er mánadag og mikudag frá kl. 14-17 í missiónshúsinum á Sandi. Drekkamunnur er at fáa báðar dagarnar.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319130/61 655400.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Jóhannes evangelium kap. 19 vers 24.
Latum okkum ikki skera hann sundur, men latum okkum heldur kasta lut um hann, hvør skal fáa hann, tí at skriftin skuldi ganga út.

Revar eiga holur, og himmalsins fuglar reiður, men mennisksjasonurin eigur ikki so mikið sum hann kann leggja høvur sítt at.

Tað einasta sum Jesus átti av týdningi var ein kyrtil, men hvussu hann hevði fingið hann, vita vit ikki. Men hvussu hann kom av við hann, tað vita vit.

Kyrtilin var tikin av honum tá hann varð hongdur á krossin.

Hermennirnir vildu ikki skera hann sundur, hann var vavdur í einum frá ovast til niðast, so tann, sum skuldi hava hann, skuldi hava hann heilan.

Tá Jesus varð hongdur upp á krossin, tá lá ein heilur kyrtil klædningur við krossins fót.

Hendan fyrsta langafríggjadag kundi ein syndari fara heim frá Golgatha ílætin Jesu kyrtil.

Nú er tað ikki frelsa at hava borið Jesu kyrtil. Men hann er eitt bílæt upp á tann klædning sum tú mást eiga, um tú skal verða frelstur.

Tá Jesus var gjørdur til synd, tá tók Gud rættvísisklædningin av honum. Hesin klædningur liggur nú til reiðar til tín. Og hendan frælsis klædning verður tú ílætin við trúgv á tað dýra ofrfur sum var offrað á Golgatha Jesus. Ert tú ílætin hendan frælsis búna, sum er trúgvin á Jesus, so kanst tú liva hettar lívið í frimóð, tú ert áveg heim í tað nýggja Jerusalem.

Óttast ikki, tú ert dekkaður í blóðinum av tí fullgjørda verkinum á Golgatha.

Regin Høgnesen

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 22.3. Skála, tlf. 44 14 90
Sunnudagin 23.3. Runavík, tlf. 44 70 10

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.